Álit

í

løgtingsmáli nr. 60/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Leingja heimildina at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging og umbygging av ávísum leigubústøðum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 4. desember 2025, og eftir 1. viðgerð 9. desember 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 10. desember 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið hevur til endamáls at leingja heimildina at endurrinda inngangandi meirvirðisgjald av byggikostnaðinum í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum fyri meira enn 200.000 kr., mvg ikki íroknað, og um talan er um í minsta lagi tveir leigubústaðir, harav í minsta lagi 10%, tó minst ein bústaður, skal verða atkomuligur og kunna nýtast av fólki í koyristóli, og har matrikulnummarið, har leigubústaðirnir verða bygdir ella umbygdir, ikki hevur við sær lán, har rentustuðul verður veittur. Arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, skal vera endað í seinasta lagi fimm ár eftir, at umsóknin er góðkend.

Verandi heimild er bert galdandi til 31. desember 2025. Hon varð av fyrstantíð sett í gildi fyri at eggja persónum og fyritøkum at byggja/umbyggja bygningar til leigubústaðir. Síðani 2020 og til og við 30. september í ár eru endurrindaðar tilsamans 198,5 mió. kr.

Undir viðgerðini er nomið við, hvørt galdandi treytir eru tær røttu, eitt nú áramálið fyri avskriving av meirvirðisgjaldinum í sambandi við eftirfylgjandi sølu. Men ongar treytir verða broyttar við hesum uppskotinum, tí landsstýrið arbeiðir við einum samlaðum bústaðarpolitikki, har nógvir aðrir tættir í einum slíkum verða viðgjørdir í einum tvørpolitiskum arbeiði.

Nevndin er samd um, at júst hetta, at meirvirðisgjald verður endurrindað við bygging av leigubústøðum, er nú eitt kent amboð, sum hevur gjørt mun og hevur eggjað til at byggja leigubústaðir, og semja er um at varðveita heimildina og leingja hana við 5 árum til 31. desember 2030.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. desember 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	